# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Hetta er Amerika. Møguleikans dyr standa opnar fyri øllum kvinnum, sum vilja hava møguleikan*
*Sarah Palin*

# Sarah Palin góðkend

**Hóast hon ikki hevur tær nógvu royndirnar, legði Sarah Palin ikki fingrarnar ímillum, tá hon helt sína fyrstu røðu sum varaforsetaevni**



*Sarah Palin á røðarapallinum í Minneapolis í nátt*
*Mynd: Polfoto*

- Tað er mær ein heiður at taka av áheitan tykkara um at tilnevna meg varaforsetaevni, segði Sarah Palin, tá hon fór undir tað, sum politiskir eygleiðarar tulkaðu sum ta týdningarmestu røðuna, sum hon nakrantíð hevur hildið og kanska fer at halda. Eftir fagnaðinum undir og aftan á røðuna at døma er lítil ivi um, at sjálvt tey ivingarsomu á uppstillingarfundinum høvdu góðtikið hana. Spurningurin er so, um veljararnir hava somu hugsan.

Fyri bara nøkrum fáum døgum síðani vóru tað tey fáu, sum høvdu hoyrt navn hennara, og tað kom eisini púra óvart á teir flestu eygleiðararnar, at John McCain valdi hana til sítt varaforsetaevni. Men summir eygleiðarar siga, at hetta er bara enn eitt dømi um, at McCain gongur sínar egnu leiðir og tekur tær avgerðir, sum hann heldur vera tær bestu.

Sarah Palin gjørdi eisini sítt besta í nátt fyri at liva upp til álitið, og hóast hetta var hennara fyrsta veruliga røða, brúkti hon hana til at søkja at mótpartinum. Eitt nú vildi hon vera við, at Barrack Obama hevur drigið orðið „broyting" inn í valstríðið við tí fyri eyga at fáa persónligan ágóða burturúr.

- Sjálv eri eg ikki í iva um, hvørjar møguleikar amerikanararnir hava hesaferð. Í politikki eru tað valevni, sum brúka broyting til at fremja egna lívsleið, og so eru tað tey, sum brúka sína lívsleið til at fremja broyting, segði Sarah Palin og varð stórliga fagnað.

Tað var eisini týðiligt, at hon royndi at dyrgja eftir teimum kvinnuligu veljarunum.

- Hetta er Amerika, og allar dyr standa opnar fyri øllum kvinnum, segði hon.

Sarah Palin er guvernørur í oljustatinum Alaska, og í røðuni nam hon eisini við tann orkupolitikk, sum ein stjórn undir McCain fer at reka. Hon segði, at USA hevur nóghva olju, og at ein komandi republikonsk stjórn fer at dúva upp á amerikanska orku og amerikanskt uppfinningarsnildi.

## STUTT SAGT

### Løgreglumenn vóru drápsmenn

Tveir ísraelskir løgreglumenn eru funnir sekir í drápi, tá teir arbeiddu sum eftirlitsmenn á Vestara Áarbakka í 2002, og teir kunnu nú vænta at fáa upp í 20 ára fongsul, skrivar AP.

Shachar Botbeka og Denis Alhazova arbeiddu í býnum Hebron á Vestara Áarbakka í 2002, og saman við tveimum starvsfeløgum fóru teir herjandi ígjøgnum býin ein dagin í mars tað árið. Millum annað tveittu teir táragassgranatir eftir fólki í gøtunum, og fýra tilvildarligir palestinskir menn vórðu tiknir inn í ísraelska hernaðarbílin og bukaðir. Tveir av teimum palestinsku monnunum blivu tveittir úr bilinum, meðan hann koyrdi við nógvari ferð, og annar fekk so stóran skaða í høvdið, at hann doyði.

Tað vísti seg, at teir ísraelsku løgreglumenninir høvdu tikið allan tilburðin upp á sjónband, og tí tók tað ikki rættinum so langa tíð at døma Shachar Botbeka og Denis Alhazova sekar. Nú bíða teir so eftir, hvør revsingin verður, skrivar AP.



*Ísraelskir hermenn í gøtunum í Hebron á Vestara Áarbakka*
*Mynd: Polfoto*

### Spanskur gestur í Íslandi

Spanski uttanríkisráðharrin, Miguel Angel Moratinos, er í hesum døgum á almennari vitjan í Íslandi, har hann er gestur hjá íslendska uttanríkisráðharranum, Ingibjørg Sólrún Gísladóttir. Umframt uttanríkisráðharran skal Moratinos hitta aðrar íslendskar politikarar.

Miguel Angel Moratinos hevur verið spanskur uttanríkisráðharri í góð fýra ár, síðani flokkur hansara, Sosialistaflokkurin, vann tjóðartingsvalið og stjórnarvaldið í 2004. Á valinum í vár fekk flokkurin 44 prosent av atkvøðunum. Tað tryggjaði stjórnini at verða sitandi, og uttanríkisráðharrin er tann sami sum undan valinum.

# Ike fór í luftina

**Eftir bara fáum tímum mentist tropiski stormurin Ike til eina av teimum harðastu ódnunum**

Teir seinastu dagarnar hevur tropiski stormurin Ike ferðast tvørtur um Atlantshavið, men í nátt sprongdist hann, sum veðurmenninir kalla tað. Eftir seks tímum mentist Ike frá stormi til eina tropiska ódn í flokki 4.

Harvið er Ike tann fimta tropiska ódnin í ár og tann triðja, sum hevur verið harðaði enn í 3. flokki.

Í morgun var vindferðin í Ike umleið 60 metrar um sekundið og í hvirlunum upp í einar 70 metrar umsekundið. Veðurmenninir siga, at teir næstu dagarnar fer Ike inn yvir Karibia, og at haðani fer hon helst ímóti Florida.

# Høgi matvøruprísurin kemur væl við

**Tað ger góðan mun í bardaganum ímóti rúsevnum, at matvørurnar eru vorðnar so dýrar**



*Góði matvøruprísurin fær nógvar afghanskar bøndur at leggja um frá opium til grønmeti og annað*
*Mynd: Polfoto*

Meðan brúkarar um allan heim kæra seg um, at maturin er dýrkaður so nógv, fegnast ST-sendimaðurin í Afghanistan, Antonio Maria Costa, um gongdina, tí tað ger tað lættari hjá ST og NATO at fáa bøndurnar í Afghanistan at dyrka grønmeti og annað til matna heldur enn rúsevnisplantuna opium.

Í einari nýggjari frágreiðing um støðuna skrivar Antonio Maria Costa, at teir afghonsku bøndurnir brúka næstan 20 prosent minni lendi til at dyrka opium, enn teir gjørdu um hesa tíðina í fjør. Í 18 landslutum hevur tað eydnast at fáa bøndurnar at fara frá opium til at dyrka grønmeti og ymsar matvørur.

ST, NATO og teir afghonsku myndugleikarnir hava tey seinastu árini roynt at fáa bøndurnar at dyrka annað heldur enn opium, sum fer til at gera rúsevnið heroin. Hetta hevur verið eitt torført stríð, tí bøndurnir hava fingið nógv meiri burturúr at dyrka opium heldur enn grønmeti og slíkt. Men nú matvøruprísurin er hækkaður nógv á altjóða marknaðinum, er munurin minkaður nógv, og tí velja altsamt fleiri bøndur at leggja um, skrivar Antonio Maria Costa.

Men hóast tað gongur tann rætta vegin, verða framvegis 157.000 hektarar av afghonskum lendi brúktir til at dyrka opium. Tað er umleið 30 prosent minni enn í fjør, og tað er serliga har suðuri í landinum, at nógvir bøndur framvegis dyrka opium.